Landsstýrið fremur vanbýti millum skip og manning við stuðulslóggávuni



Hetta kunnu vit undir ongum umstøðum góðtaka. Í línuveiðuni er tað so, at er tørvur á stuðul til skipini, so er tørvurin ikki minni til teir, sum eru við.

Manningin luttekur her í rakstrarútreiðslum, og tí kann ikki undir nøkrum umstøðum vera grundarlag fyri vanbýti millum fólk og skip í hesum veiðihætti, sigur Føroya Fiskimannafelag m.a. í skrivi til løgtingið um stuðulslógirnar

Í samband við studning til fiskivinnuna hevur Føroya Fiskimannafelag sent Føroya Løgtingi skriv, har tað setur fram ymsar viðmerkingar til tey ymsu tilmælini hjá landsstýrinum.

Skrivið er soljóðandi:

Felagsstjórnin í Føroya Fiskimannafelag hevur viðgjørt løgtingsmálini nr. 133 og 134 um studning til fiskivinnuna og hava vit fylgjandi viðmerkingar til tey ymsu tilmælini hjá landsstýrinum:

Tíðaravmarkaður eykastuðul

Samb. hetta uppskot skal í tíðarskeiðnum veitast prísviðbót og rakstrarstudningur, sum svarar til eina prishækking uppá 50 oy/kg, og svarar hetta nøkurlunda til prislækkingina 1. januar í ár.

Hesi 50 oy/kg verða so býtt millum skip og manning samb. sáttmálan millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag. Hetta er eisini gjørt á ein rættan hátt hvat trolveiðuni viðvíkir. Manningin eigur her 27% og verður hetta av 50 oy eisini 13,5 oy/kg.

Men vit vilja gera vart við, at hetta er ikki rætt, tá talan er um línuskip. Her luttekur manningin í ávísum felagsútreiðslum og fær av restini 45%. Av eini prislækking uppá 50 oy/kg missir manningin tey 45% ella 22,5 oy/kg og reiðariið missir tilsvarandi minni.

Tað skilst at gjørt verður á hendan hátt í staðin fyri at hækka prísin beinleiðis gjøgnum ráfiskagrunnin. Tískil er eisi ini neyðugt í størri mun at taka hædd fyri teir sáttmálar, sum veruliga eru galdandi í vinnuni.

Men vit rokna við, at hetta verður rættað í teirri viðari viðgerðini av málinum.

Feskfiskastudningurin annars

Fyri høvuðsbólkarnar av festfiskaskipum vilja vit gera vart við fylgjandi:

Viðvikjandi ísfiskatrolarum. Skotið verður upp at hækka rakstrarstudningin til trolarar við 60 oy/kg fyri ávís »bilig« fiskasløg, men einki er ætlað fiskimonnum.

Hesum vilja vit harðliga mótmæla. Verður mett eftir veiðusamansetingini seinasta ár, kemur henda øking í rakstrarstudninginum at geva støkum smærri trolarum 26 oy/kg, partrolarum 31 oy/kg og stórum trolarum 48 oy/kg. Og merkir hetta aftur eina óbeinleiðis prishækking hjá reiðarum uppá ávísavist 42, 50 og 75 oy/kg, sum manningin ikki er ætlað at fáa nakað burturav.

Vit meta, at tað als ikki er nakað grundarlag fyri einum slíkum misnýti. Vit vita, at bæði skip og fólk høvdu eitt gott ár í fjør, og roknast kundi við somu veiðu og somu inntøku sum í 1983 hevði vallað verið neyðugt við nøkrum tiltøkum.

Men støðan í ár er sum kunnugt munandi broytt. Lutvíst er fiskaprisurin fallin munandi, og vit vita eisini at veiðan í ár hevur verið munandi minni enn somu tíð í fjør.

Grundgevingin fyri uppskotinum hjá landsstýrinum er at inntøkurnar »frammanundan eru á einum hampuligum støði«. Nú vita vit ikki hvat landsstýrið roknar fyri at vera eitt hampuligt støði. Veruleikin er tann, at umborð á hesum trolarum verður arbeitt so nógv, at tímalønin uttan iva er minni enn minstatímalønin á landi. Arbeiðsdagurin er í miðal yvir 12 tímar, og um vit bert rokna út hvat 12 tímar um dagin í miðal hevði givið á landi við yvirtíð og halgidagsviðbót v.m. skuldi hvør dagur umborð givið umleið tvær daglønir fyri 8 tíma dag.

Men her kunnu vit vísa til hjáløgdu tøl sum sýna, at inntøkurnar við teimum smærru trolarunum hava verið umleið 30% lægri fyrsta ársfjórðing í ár í mun til tíðarskeið í fjør pr. dag umborð. Við teimum stóru trolarunum er minkingin ikki so stór, men her vóru inntøkurnar frammanundan eisini munandi lægri. Tað skal eisini verða skoytt uppí, at fyrsti parturin av árinum vanliga er nógv tann besti, og miðaltalið fyri árið eftir vanligu gongdini verður munandi lægri. Tað er einki at ivast í, at ein slík minniinntøka eisini merkist hjá fiskimonnum. Úrslitið verður tað, at trupult verður at manna skipini við góðum fólki, og tá hava vit skjótt tapt meira fyri minni.

Vit fara tískil at krevja, at fiskimenn fáa sín part av tí sum er ætlað hesi veiðu, og vilja enn einaferð undirstrika at vit halda ikki grundarlag vera fyri teirri broyting í lutfallinum millum fiskimenn og skip, sum her er skotið upp.

Annars fara vit eisini at gera eina viðmerking til § 7 í uppskotinum, har veitt verður 40 oy/kg fyri ávís djúpvatnsfiskasløg til trolarar omanfyri 1400 hk. Henda regla var upprunaliga ætlað sum ein samsýning til teir av teimum stóru ísfiskatrolarunum, sum ikki fingu íslandsloyvi. Nú er tað hent, at allir trolararnir hava mist íslandsloyvið, og tí koma teir av sær sjálvum at fáa hendan studningin. Tað eru tó tveir sum hava maskinorku undir 1400 HK, sum ikki koma at fáa hesa viðbót. Hetta má haldast at vera órímiligt, at tveir av trolarunum við íslandsloyvi nú skulu vera við skerdan lut, og fara vit at biðja um at hetta verður broytt.

Annars duga vit ikki at siggja nakað høpi í at avmarka stuðul til ávís fiskasløg til eina ávísa maskinorku. Er áhugi fyri at fáa hesi fiskasløg veidd, má áhugin vera tann sami, hvør maskinorka tað enn er sum veiðir. Eitt maskinorkutal kann kom at vera sera tilvildarligt, og fara vit at mæla til at henda treytin snøgt sagt verður strikað. Ein slík broyting kemur so ikki at koppa nakrari figgjarætlan.

Viðvikjandi línu- og snelluskipum. Her fara vit fyrst at gera vart við, at talan man vera um eitt mistak, tá § 5 stk. g. í uppskotinum bert nevnir »línuskip«. Tað eru eisini skip yvir 110 BRT, sum eru á snelluveiðu, men vit rokna við, at hetta verður rættað.

Annars hava vit trupulleikar við at skilja logikkin aftanfyri landsstýrisuppskotið hvat línuveiðuni viðvíkir. Fyri fiskimenn verður skotið upp, at viðbótin á skipum omanfyri 110 BRT verður hækkað úr 50 oy/kg, tó 60 oy/kg fyri brosmu og longu, í 120 oy/kg. Hetta skal vera endurgjald fyri ta lækking í avreiðingarprisinum, sum er farin fram. Hetta skal eisini verða endurgjald fyri ta lækking, sum roknast kann við, tá prísmunurin millum húk- og netveiddan fisk, eftir hvat vit skilja, verður avtikin.

Og hetta er eisini endurgjald fyri avtøkuna av teimum 40 oy/kg, sum eftir serligari reglu hevur verið veitt ávísum fiskasløgum á sumri. Umroknað til fiskapris er hetta endurgjald ca. 145 oy/kg.

Men endurgjaldið til skipini er munandi meira enn hetta. Skotið verður upp at hækka rakstrarstudningin yvirhøvur til 170 oy/kg. Hetta merkir ein hækking uppá 134 oy/kg fyri tosk, hýsu og annars allan fisk, sum ikki er veiddur á føroysku landleiðini, og er hetta nógv tann størsti parturin av veiðuni, sum fær hesa hækking. Við galdandi sáttmála luttekur manningin í ávísum felagsútreiðslum, og tá allar hýrur er goldnar fær skipið 37% av avlopinum. Tí svarar henda hækking til eina umvegis hækking í prísinum uppá 362 oy/kg.

Fyri rut, sum verður veitt undir Føroyum, er hækkingin úr 73 oy/kg og er hon tiskil 97 oy/kg. Í hesum førinum er talan um eina umvegis prishækking uppá 260 oy/kg.

Ætlanin er eftir øllum at døma at veita skipunum eitt endurgjald, sum er meira enn dupult so stórt sum tað ið er ætlað manningini. Hetta kunnu vit undir ongum umstøðum góðkenna. Í línuveiðuni er tað soleiðis, at er tørvur á stuðul til skipini, so er tørvurin ikki minni til teir, sum eru við. Hesum hava vit greitt frá ferð eftir ferð, so endurtøka er óneyðug. Men manningin luttekur her í rakstrarútreiðslum, og tí kann ikki undir nøkrum umstøðum vera grundarlag fyri vanbýti millum fólk og skip á hesum veiðihætti.

Eitt uppskot sum hetta verður mett sum ein manipulering av tí býti, sum feløgini frammanundan eru samd um. Og tað sama kann eisini sigast um uppskotið viðvíkjandi garnaskipum og trolarum.

Ein slík broyting í tí avtalaða býtinum millum feløgini kemur uttan iva at fáa avleiðingar fyri sáttmálan, sum annars er uppsagdur, og sum samráðingar skulu vera um í næstum.

Vit vilja undirstrika, at hetta sjálvsagt ikki skal fatast sum ein hóttan, men vit taka hendan spurning í rama álvara, og vit skilja á fiskimonnum, at teir hava júst somu uppfatan. Hetta verður eisini undirstrikað av teirri sannroynd, at eftir øllum at døma verður minkað um studningin til ráfiskagrunnin og økt um rakstrarstudningin. Hetta økir bert um tað skeiva býtið millum skip og fólk. Tað má tykjast marghátt ligt at í eini tíð, har vit hava havt stórt prísfall á serliga upsa at minka um játtanina til ráfiskagrunnin. Eitt úrslit av hesum er, at fiskimenn als ikki fáa marknaðarpris fyri tosk og hýsu, men mugu gjalda munandi inn í grunnin, sum so aftur verður goldið til upsa. Hetta meta vit at vera ein nóg so lættan máta at sleppa undan eini marknaðarkreppu.

Agnstudningur. Meðan tosað verður um ráfiskagrunn tykist tað eisini løgið at minka um játtanina til agnstudning. Seinasta ár vórðu játtað 9 mill. meðan nú verður bert skotið upp 8 mill. Tær 9 mill. seinasta ár komu ikki at røkka til, og tað serliga av teirri orsøk, at frammanundan varð agnstudningur ikki goldin út fyrr enn agnið varð selt. Nú fær agnið studning beinanvegin tað kemur á goymslu. Tí kann hetta uppskot bert koma at dýrka um agnið, og tað var væl ikki ætlanin við hesi skipan.

Um mun á avreiðingarprísum og viðbótum á somu veiðu

Sum vit skilja er ætlanin at sleppa undan ymsum avreiðingarprísum fyri ymsar veiðuhættir, og hetta er eisini ein skipan, sum nógv misnøgd hevur verið um. Men vit duga nú ikki at siggja nakað sum helst skil í, at innføra bæði ymsan studning og ymsan prís fyri sama veiðihætt, soleiðis sum skotið verður upp her. Tað má avgjørt vera tað rættasta at menn í somu veiðu so vítt gjørligt eru undir somu treytum, bæði hvat prísi og prisviðbót viðvíkir. Alt annað kann bert føra misskiljingar við sær.

Saltfiskaviðbót

Skotið verður upp, at hækka prisviðbótina til línuskip á saltfiskaveiðu við 75 oy/kg í 125 oy/kg. Hetta er ein hampiligur bati, men vit fara at heita á tingið um at skipa soleiðis fyri, at henda hækkaða viðbótin eisini verður galdandi fyri seinasta ár.

Tá studningslóggávan

Framhald á síðu 12